Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Magna Eliana Mørkøre, løgtingskvinna

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Tannrøkt og tannviðgerð til eldri borgarar og til fólk, sum eru avlamin

Spurningar:

1. Hvussu líður við arbeiðinum at kanna tørvin hjá eldri og teimum, ið eru avlamin, ið kunnu hava tørv á serligum tilboði í mun til tannrøkt og tannviðgerð?
2. Ætlar landsstýriskvinnan at tryggja, at eisini eldri, ið hava serligan tørv, fáa eitt nøktandi tilboð um tannrøkt?
3. Eru ætlanir um at tryggja góða tannrøkt og viðgerð til hendan bólk við lóg eins í okkara grannalondum?

Viðmerkingar:
Tannlæknafelagið hevur upplýst, at talið á borgarum, sum ikki fáa tannrøkt av ymiskum orsøkum, er vaksandi. Orsøkin til hesa gongd er tó ikki nágreinað. Samstundis er tað ein veruleiki, at livialdurin í Føroyum hækkar, og við hesum veksur eisini talið á borgarum, sum hava serligan tørv á tannrøkt og tannviðgerð, serliga hjá teimum, ið eru eldri og avlamin.

Sum sjúkrarøktarfrøðingur á eldraøkinum kennir undirritaða væl til trupulleikan við manglandi tannrøkt og tannlæknaviðgerð til borgarar við avlamni. Ein avbjóðing er, at tað ikki altíð er atkomuligt hjá fólki við avlamni at koma til eina tannlæknastovu. Harumframt eru eisini borgarar við eitt nú demens, sum ikki fáa nøktandi hjálp, tá ið teirra tannheilsa versnar. Hesin bólkur hevur ofta torført við at samstarva og samskifta við tannrøktarar og tannlæknar.

Í mai 2023 setti tingkvinna Annika Olsen ein skrivligan fyrispurning (§ 52a, nr. 52-101/2022) um tannrøkt til eldri borgarar og fólk, sum eru avlamin, til táverandi landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá.

Í svarinum frá landsstýriskvinnuni varð upplýst, at skipað hagtøl ikki finnast fyri, hvussu nógvir borgarar ikki fáa neyðuga tannrøkt vegna heilsustøðu, avlamni ella óhjálpni. Landsstýriskvinnan vísti somuleiðis á, at í Føroyum er einki lógartryggjað tilboð til eldri og avlamin, sum ikki kunnu nýta vanligu tannrøktartilboðini. Í Danmark hava kommunurnar síðani 1994 veitt umsorganartannrøkt til hesar borgarar sum part av eini lógartryggjaðari skipan.

Ein líknandi skipan kundi verið sett í verk í Føroyum fyri at tryggja, at hesin bólkurin eisini fær ta tannrøkt og tannviðgerð, tey hava uppiborið.

Táverandi landsstýriskvinnan svaraði, at hon var sinnað at hyggja nærri at hesum bólki. Hon vísti tó á, at eitt tilmæli um, hvussu børn og ung við serligum sjúkueyðkennum ella tannsjúkum kunnu loftast, skuldi vera liðugt fyrst.

Mítt ynski við hesum fyrispurningi er at fáa greiðu á, um arbeiðið við at tryggja tannrøkt til hesar bólkar er sett í gongd, og um ikki, hvør orsøkin til drálið er.

Á Løgtingi, 31. mars 2025

Magna Eliana Mørkøre